# Nýtt og gott gamalt

**Í Runavík hava teir fingið gamlan felagsmann at taka um róðrið, og burtursæð frá einum álopsspælara ætla teir sær bara at dúva upp á lokalar kreftir**

**NES SÓKNAR ÍTRÓTTARFELAG**
**FO-620 Runavík**
**Tlf. 448100/Fax 448566**
**www.nsi.fo**

**STOVNAÐ**
**24.03.1957**

**FORMAÐUR**
**Jákup Mortensen**

**MEISTARAR**
**Ongantíð - besta úrslit nr. 2 í 2002**

**STEYPAVINNARAR (2)**
**1986 og 2002**

**GREIPUVINNARAR**
**Ongantíð**

**Í 1. DEILD (19 ÁR)**
**1976, 1979, 1984-88, 1991-92, 1994-95, 1997-**

**Í EUROPA (2)**
**UEFA Cup 2003/04, Intertoto 2004/05**

## NSÍ

*Jóannes Hansen*

Superveteranurin Jens Martin Knudsen í aftastu ódnini, og Christian Høgni Jacobsen, sum fyri stuttum er komin fyri seg aftur eftir drúgvan skaða, í fremstu ódnini. Teir báðir tykjast vera profilarnir á NSÍ liðnum, sum fyri nógv størsta partin er mannað við spælarum, ið eru uppvaksnir í felagnum. Viggo Johannesen, ið bara hevur spælt við ÍF, býr í Runavík, og nú hevur hann valt eisini at skifta fótbóltsadressu. Einasti fremmanda maðurin, sum er í Runavík fyri at spæla fótbólt, er Ikechukwu Onyema, sum tóktist roynast væl, tá ið hann í fjør kom til NSÍ.

Sum so mong onnur so hava teir í NSÍ trilvað eitt sindur fyri at finna seg til sættis, eftir at pengarnir av álvara fóru at gera um seg í føroyskum fótbólti. Nú hava teir gjørt av at dúva upp á spælarar, ið eru uppaldir í felagnum.

Jógvan Martin Olsen var trý ár á venjarabeinkinum. Hann var ábyrgdarmaður, tá ið NSÍ í 2002 rakk besta úrslitinum nakrantíð. Tað árið vunnu teir silvur í landskappingini, og so vunnu teir fyri fyrstu og higartil einastu ferð Løgmanssteypið. Í fjør endaði NSÍ á sætta plássinum, og í steypakappingina rukku teir enn eina ferð í finaluna, sum teir taptu 3-1 ímóti HB.

Nú er Trygvi Mortensen venjari. Nýggi venjarin er NSÍ felagsmaður. Har spældi hann øll síni fótbóltsár, og har hevur hann fleiri ferðir verið venjari frammanundan. Síðsta takið var í 2000. Í fjør var hann fyrsta partin av árinum hjálparvenjari í NSÍ, áðrenn hann tók uppgávuna á seg at royna at bjarga B68 undan niðurflyting.

Eingin ivi er um, hvør dreymurin hjá NSÍ er. Trý feløg í Eysturoy hava higartil vunnið FM heitið. NSÍ telist ikki millum hesi, og tað hava teir svørtu og gulu í fleiri ár viljað gjørt nakað við. Higartil hevur tað ikki eydnast, og nú fara teir undir at gera nýggja roynd.

Sammett við tá ið Trygvi Mortensen var venjari í 2000 eru umleið helmingurin av spælarunum teir somu. Teir, sum ivaleyst skulu bera liðið, hava verið við í mong ár og vita tískil, hvat tað snýr seg um. Fýra spildurnýggir spælarar bjóða seg fram. Talan er um blaðungar dreingir, ið hava verið við í yngru deildunum, og sum nú eru so mikið gamlir, at teir hava aldur at vera við í kappingini um plássini á besta liðnum.

Ungu menninir fara neyvan beinanvegin at vera millum stuðulsspælararnar, men teir fara at økja um kappingina um plássini. Umframt hesar eru 4-5 aðrir, sum ótolnir bíða, inntil teir rølla 16 ára aldursmarkinum. Teir hava undanfarnu árini vunnið FM og steypakappingar í yngru deildunum. Nú venja teir nógv við besta liðnum, og teir ætla sær at vinna FM við NSÍ. Um tað fer at eydnast, og um tað fer at verða fyrsta NSÍ FM heitið nakrantíð, sum teir kanska fara at vinna, fara árið í ár og komandi árini at vísa.



Jónstein Petersen er ein av royndu leikarum, sum skulu bera NSÍ móti tindunum í ár

| Navn | pláss | landsdystir/mál | áður leikt við |
|---|---|---|---|
| Jens Martin Knudsen | málverji | 63/0 | GÍ, Leiftur |
| Tórður Thomsen | málverji | | Sumba |
| Óli Hansen | verja | 1/0 | GÍ |
| Dánial Hansen | verja | | B68 |
| Viggo Johannesen | verja | | ÍF |
| Áki L. Hansen | verja | | |
| Sjúrður Jacobsen | verja | 1/0 | |
| Einar Hansen | verja | | |
| Brynjolvur Nielsen | verja/miðvøllur | | |
| Kári Hansen | verja/miðvøllur | | |
| Búgvi Olsen | verja/miðvøllur | | |
| Jústinus Hansen | miðvøllur | | |
| Andy Olsen | miðvøllur | | |
| Bogi Løkin | miðvøllur | | |
| Jónstein Petersen | miðvøllur | | |
| Gert Langgaard | miðvøllur/álop | | |
| Helgi L. Petersen | miðvøllur/álop | | |
| Ikechukwu Onyema | álop | | |
| Debus Danielsen | álop | | |
| Jan Nónklett | álop | | |
| Christian Høgni Jacobsen | álop | 20/2 | Esbjerg, Vejle |

**Tilgongd**

| | |
|---|---|
| Viggo Johannesen | ÍF |
| Christian Høgni Jacobsen | Vejle |
| Einar Hansen | unglingur |
| Búgvi Olsen | unglingur |
| Debus Danielsen | unglingur |
| Bogi Løkin | unglingur |

**Frágongd**
Eingin

**Venjari: Trygvi Mortensen**
Hjálparvenjari: Bogi Lervig
Liðleiðari: Jonhard Hansen, Andrass Olsen, Rósing Johannesen og Jónsvein Olsen
Fysioterapeutur: Marjun Thomassen